Meginfelag Áhugaleikara Føroya

Undir Pisuvarða 2 * FO-100 Tórshavn * Tel. 285624 * E-mail: maf@maf.fo * www.maf.fo

# At skriva stuttleik

## 28. – 30 mars 2025 á Gjáargarði



So er at seta kross í kalendararn **28. – 30. mars 2022** og tekna seg til skriviskeiðið **At skriva stuttleik**, ið MáF skipar fyri á Gjáargarði. Tveir spennandi dagar har tú fært møguleika at menna hugskot til eina søgu á palli í einum kreativum og spennandi umhvørvi.

Á hesum skeiðnum lærir tú, hvussu mann skrivar ein stuttan leik, har leikgongdin varar í minsta lagi 5 minuttir og í mesta lagi 15 minuttir. At skriva ein stuttan leik kann vera minst líka avbjóðandi sum at skriva ein langan leik, tí tú við færri orðum skalt skriva eina søgugongd, sum helst skal halda áhugan hjá áskoðaranum fangaðan. Á skeiðnum lærir tú at skriva stutt og neyvt, og hvussu eisini tann stutta søgan kann skrivast á ein spennandi og áhugaverdan hátt og setast á pall.

Undirvísari verður **Gunvør Reynberg,** ið er útbúgvin sjónleikari á Statens Teaterskole og hevur arbeitt sum sjónleikari á eitt nú Aalborg Teater og Det Kongelige Teater og eisini hevur spælt í fleiri kabarettum. Umframt at arbeiða sum sjónleikari og leikstjóri, hevur Gunvør í fleiri ár arbeitt sum tekstahøvundur, har hon hevur skrivað tekstir til m.a. fleiri kabarettir og poppsangir, og eisini hevur hon skrivað fleiri barnabøkur og somuleiðis umskrivað barnabøkur til eitt nú familjusangleikir.

Ætlanin við skeiðnum er at fáa í minsta lagi 5 stuttleikir, sum ætlandi skulu framførast á einum MáF-Stuttleikafestivali í heyst. Nakað líknandi sum NEATA-Stuttleikafestivalurin í 2016, men bara minni í vavi.

**Undirvísingin verður leygardag til sunnudag frá kl. 09.00 – 17.00** við matarsteðgi á middegi umframt okkurt leskandi/etandi í smáum støðgum fyrra- og seinnapart. ***Gevi gætur, at møtt verður fríggjakvøldið 28. mars kl. 18:00 til vælkomst, samansjóðing og ábit.***

Prísurin fyri hvønn persón fyri alt skeiðið íroknað uppihald er **kr. 2.500 (dupultkamar) / kr. 3.100 (einakamar)**. Í mesta lagi 10 pláss.

Tú kanst tekna teg elektroniskt inni á heimasíðuni hjá MáF: MÁF » At skriva stuttleik 28. – 30. mars 2025. Skráseting er fyrst galdandi, tá ið goldið er á konto í **Eik Banka: 9181-185 132 4 í seinasta lagi 16. mars 2025**.